# Gjørt vakstraravtalu

Í einari roynd at styrkja og menna útjaðarasamfeløgini skrivaðu íslendska stjórnin og kommunurnar í vestara parti av Norðurlandinum undir ein vakstrarsáttmála í gjár. Talan er um eina trý ára sáttmála, og eftir honum skal ríkiskassin rinda umleið átta mió. krónur í okkara pengum til ymiskt mennandi virksemi hesi árini. Sáttmálin er ein partur av tiltøkunum, sum stjórnin setir í verk fyri at avmarka avleiðingarnar av skerdu toskakvotuni.



*Skagaströnd er ein av bygdunum í Norðurlandi Vestra (Savnsmynd)*

# Fleiri pengar nýttir til lønir

Tað vórðu útgoldnar 501 mió. meira í lønum í 2007, samanborið við 2006. Nú nýtt ár er byrjað, kunnu samlaðu lønargjaldingarnar fyri 2007 gerast upp. Hetta vísir, at næstan 7 mia. vórðu útgoldnar í lønum í fjør. Tað er ein vøkstur uppá hálva mia. í mun til 2006, sum er 8% meira. Størsti vøksturin er innan privatu tænastuvinnurnar. Har eru 13% fleiri lønarkrónur í 2007. Her er tað serliga sjóflutningur og fígging og trygging, sum hava ein stóran vøkstur, 21 og 20%, men eisini gistihús- og matstovu-virksemi er vaksið nógv og hevur goldið 14% meir út í lønum. Í byggivinnuni eru 492 mió. goldnar í lønum í fjør, tað eru 54 mió meir enn árið fyri, ein vøkstur uppá 12%. Samlað er ein vøkstur uppá 11% innan bygging og ídnað.Fyri almennar tænastur eru goldnar 6% meir í lønum í 2007 samanborið við 2006.

# Hava borað góðar 3000 metrar á Williamleiðini

**Neyvan nøkur olja funnin – jarðfrøðin eisini øðrvísi enn mett**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Jólini og nýggjarið eru farin aftur um bak, og tað verður framvegis borað á landgrunninum. Um einar 10 dagar hevur boripallurin Transocean Rather borað í umleið tríggjar mánaðir á føroyska landgrunninum. Borurin varð settur í undirgrundina á Williamleiðini 22. oktober. Søgur hava gingið millum manna um, at olja er funnin, nú flutningurin av tilfari úr basanum í Runavík til boripallin er øktur nógv. Onkur hevur lagt tað í økta virksemi á basanum í Runavík, at okkurt spennandi er við at henda í Williambrunninum.

Sosialurin hevur spurt hjá BP, hvussu støðan er, men har er eittans svarið, at ongir upplýsingar verða latnir út enn.

Blaðið skilur tó frá keldum, sum ikki vilja leggja navn til, at eingin olja er funnin enn. Boriarbeiðið gongst sum ætlað, tó at tað hava verið seinkingar orsakað av, at jarðfrøðin ikki júst er soleiðis háttað sum jarðfrøðingarnir høvdu roknað við. Tosað verður um innskot og ójavnt tilfar, sum hevur gjørt boringina torførari.

Veðrið hevur sum vera man eisini tarnað boringini. At boripallurin ikki var tøkur sum ætlað til seinasta summar var sjálvandi ein strika í rokningini, men hetta er tað, sum oljufeløgini mugu rokna við, serstakliga í eini tíð, har tað er so torført at fáa boripallar. Tað var tí ikki nummar eitt at seta borin í á vetrartíð.

Sum skilst er borurin komin niður á góðar 3000 metrar. Samlaði teinurin er 4750 metrar. Dýpið har borað verður er umleið 750 metrar. Hetta merkir, at borað er gjøgnum góðar 2000 metrar av gróti og tilfari, og enn resta so umleið 1500 til 1700 metrar í at bora.




*Vit síggja hvar Williambrunnurin verður boraður á landgrunninum*

# Útlendsku ferðafólkini skulu fáa fisk at eta



*Noreg er fiskivinnutjóð, men bjóðar fremmandu gestunum pizza og búff, sigur Helga Pedersen, fiskimálaráðharri*

**Norski fiskimálaráðharrin fýlist á, at matstøðini í Norðurnoregi fylla matarseðilin við kjøtvørum. Tær skulu bjóða gestunum fisk, sigur hon**

FERÐAVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Helga Pedersen, fiskimálaráðharri, gav norsku ferðavinnuni ein umgang, tá hon í síðstu viku helt fyrilestur á einari ferðavinnuráðstevnu í Oslo, og tað var serliga ferðavinnan í Norðurnoregi, sum stóð fyri skotum.

- Tað er syrgiligt at lesa matarseðilin á teimum flestu norðurnorsku matstovunum, segði ráðharrin.

Hon vísti á, at Noreg er kent um allan heim sum ein stór fiskivinnutjóð, men á matarseðlunum finna teir útlendsku gestirnir lítið annað enn pizza og búffar.

- Tey fremmandu ferðafólkini vita, at vit eru eitt fiskivinnuland, og tí vænta tey at fáa nógvan og áhugaverdan fiskamat. Men sannleikin er, at ferðafólkini eru vónbrotin um tann matin, sum tey fáa á borðið, segði ein sjáldsama opinskáraður ráðharri.

Við blaðið Nordlys sigur Helga Pedersen, at fiskaídnaðurin og ferðavinnan hava svikið. Hon ásannar tó, at tey sera strongu góðsku- og eftirlitskrøvini forða lokalum fiskavirkjum at selja lokalu ferðavinnuni mat, og tí hevur hon biðið umsitingina finna eina smidligari mannagongd. Sjálv er hon ikki í iva um, at Noreg eigur at gera meiri burtur úr fiskinum sum ferðafólkamati.

- Fiskaídnaðurin og ferðavinnan eiga at læra av italiumonnum, sum eru stoltir av fiski sum sermati til tey fremmandu ferðafólkini, sigur Helga Pedersen.